Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Hjálparfólk til Verkstaðið á Bakka

Hjálparfólk - 30 tímar um vikuna - søkist til Verkstaðið inni á Bakka í Vági. Talan er um eitt fast starv til setan 1. desember 2007.

Verkstaðið er eitt vart arbeiðspláss, har vit gera ymiskt handaligt arbeiði.

**Førleikakrøv**
Tí er sera umráðandi at umsøkjarin
- Er handaliga væl fyri.
- Er umsorgarfullur.
- Er tolin og dugir at læra frá sær.
- Hevur samstarvsevnir.
- Er røkin og dugur at leggja arbeiðsuppgávur til rættis eftir førimuni hjá brúkaranum.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt, bæði við framleiðsluvørum og við sosialt mennandi arbeiði, saman við teimum, sum eru á Verkstaðnum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambart avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir við viðmælum og cv. skulu sendast til:

Verkstaðið inni á Bakka.
Eggjarvegur 2.
FO 900 Vágur.

Stílað: Joan Nolsøe, leiðari

**Umsóknarfreist: 16. november 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

LÍTLIFLØTTUR

## Pedagogar til dagstovnin Lítlafløtt á Strondum

Søkt verður eftir pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna, ella eftir nærri avtalu, at byrja 1. mars 2008.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug og árræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing fyri tí einstaka barninum
- At tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- At tær dámar væl at vera úti og sært møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum
- At tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv, har tú saman við góðum starvsfelagum fært møguleika at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommuna Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at tosa við Bjørg Olsen, varaleiðara á tlf. 47 27 44 / 23 27 47.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. nov. 2007, kl.12.00.

**Dagstovnurin Lítlifløttur**
**Fløtuvegur 82**
**490 Strendur**


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



Lesið Sosialin


SUDOKU

Hvønn dag í november mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 5. desember 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í november er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-

Drigið verður aðru vikuna í desember.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.



## NOVEMBER-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | 6 | | 7 | 5 | | | 1 | |
| | | | | | 1 | | | |
| | | 8 | | | | 7 | | 3 |
| | | | | | | 6 | | 4 |
| 5 | | | 9 | | 6 | | | 1 |
| 2 | | 6 | | | | | | |
| 8 | | 9 | | | | 4 | | |
| | | | 5 | | | | | |
| | 4 | | | 8 | 7 | | 6 | 9 |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ____________________

**Bústaður:** ____________________

**Telefon:** ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

### Vinningurin í november

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin